23 ára gamal og mitt í oljuverðini

Ungur føroyingur trívist væl í London

Millum teir mongu føroyingarnar, sum arbeiða í oljuvinnuni uttan fyri landoddarnar, er Ben Arabo. Hann er 23 ára gamal og sær fegin eina framtíð fyri sær í hesi nýggju og spennandi vinnu.

Ben Arabo arbeiðir í dag sum „planning analyst" hjá amerikanska oljufelagnum Amerada Hess í London. Arbeiðið hansara er saman við øðrum búskaparfrøðingum at meta um búskaparlig alternativ í sambandi við oljuleiting.

Hann er útbúgvin sum cand. merc. í uttanríkishandli. Herfyri fekk hann boðið summarferiustarv hjá Amerada Hess í Aberdeen. Har var hann í to vikur, til hann fór á høvuðsskrivstovuna í London at arbeiða.

Vit hava spurt Ben Arabo, hvussu honum dámar hetta nýggja starvið?

-Mær dámar tað serstakliga væl, tí hetta er eitt gott høvi at fáa royndir uttanlands. Hetta er sjálvandi eitt sindur øðrvísi enn at arbeiða saman við eitt nú donum. Eg kenni meg sera væl í hesum nýggja umhvørvinum, tí bretar eru eitt fryntligt og fólkaligt fólk.

Ben Arabo sigur, at tað er sera spennandi at sita og fylgja við øllum tí, sum fer fram í sambandi við oljuleiting.

Oljuleiting er spennandi soleiðis at skilja, at ein ongantíð við vissu kann siga, um nøkur olja er at finna, hóast ein roynir at fáa meira at vita við bæði seismikki og øðrum kanningum.

Ben Arabo sigur, at tað sjálvandi er sera spennandi fyri seg at vera við til at kanna, hvat finst á føroyskum øki.

-Eg eri vísur í, at oljuvinnan er ein vinna, sum hevur nógvar møguleikar og avbjóðingar fyri føroyingar.

Ben Arabo sigur víðari, at um olja verður funnin á føroyskum øki, so er tað rættiliga sannlíkt, at oljan verður útvunnin á sjónum.



Ben Arabo, so er settur í fast starv hjá Amerada Hess í Bretlandi

– Er tað nakað, ið føroyingar duga, so er tað at fáast við sjóvinnu. So útlitini eru rættiliga spennandi at vita, um olja er á føroyskum øki.

Marknasamráðingar við bretar 2. apríl

Jan Muller

Bretar hava loksins látið frætta frá sær í spurninginum um markið millum Føroyar og Bretland. Føroyska samráðingarnevndin hevur fingið fundarboð til tann 2. apríl.

Tá fara bretar at koma við einum nýggjum útspæli. Tað vóru føroyingar, sum høvdu útspælið á tí seinasta fundinum, sum var fyri meira enn einum hálvum ári síðani.

Bíðað hevur verið eftir, at bretar skuldu koma við sínum nýggja útspæli, og beint fyri nýggjár segði ein av limunum í bretsku samráðingarnevndini, at teirra útspæl fór at koma tíðliga í nýggja árinum. Nú er tað so komið.

Árni Ólafsson, leiðari av føroysku samráðingarnevndini, váttar, at fundur er ásettur at verða 2. apríl.

Sosialurin hevur frá eini keldu frætt, at bretar fara at koma við einum „víðgongdum" útspæli, sum miðjar móti at fáa eina loysn á marknatrætuni í ár. Verður eingin loysn í hesum árinum, so veit kelda okkara at siga, at bretar umhugsa at fara til Haag-dómstólin við málinum.

Hesi tíðindi hava vit tó hvørki fingið váttað ella avsannað. Tí skulu tey takast við fyrivarni.

Annars hava bretar í sambandi við almannakunngerðingina av tí seinasta oljufundinum nær føroyska markinum gjørt av at designera tveir nýggjar teigar (blokkar) í tí Hvíta økinum.

Hesir teigar hava higartil verið partur av tí Hvíta økinum, tvs. í „ongamannalandi" millum føroysku og bretsku designeringarnar.

Soleiðis sum Sosialurin hevur skilt málið, so er einki til hindurs fyri, at bretar fremja nýggjar designeringar (tvs. seta krav fram um mark) bara hetta er teirra megin fiskimarkið (miðlinjuna). Føroyingar hava nevniliga einki krav gjørt uppá øki, sum liggja eystan fyri miðlinjuna.

DESIGNATION OF BLOCKS 204/14 AND 204/15



Kortið vísir, hvat bretar nú hava designerað tveir blokkar, sum fyrr hava verið partur av tí Hvíta økinum. Oljukeldan Suilven, sum BP hevur funnið, liggur á markinum til hesar blokkar. Fyri at kunna seta hol á nýggja feltið, sum gongur inn í grannablokkin, er neyðugt at flyta markið. Bretar hava eisini kunngjørt, at teir fara at geva út lisensir í hesum nýggju blokkunum um fáar vikur

Tórshavnar býráð
søkir eftir stuðulsfólki og pedagoki

Stuðulsfólkaskipanin søkir eftir stuðli til 7 ára gamlan skúladrong í frítíðaransing at byrja 1. apríl 1997.

Uppgávan er m.a. at vera vegleiðari í samskiftinum millum mammu og drong. Hugsað verður um integritet, sjálvskenslu og konfliktloysn. Førleiki í enskum er ein fyrimunur.

Fyri at fáa fast starv sum stuðulsfólk krevst pedagogisk útbúgving.

Grundleggjandi er at viðkomandi hevur

- evnir og hug at arbeiða við børnum og familjum, ið hava trupulleikar.
- sosialpedagogiskar arbeiðsroyndir og royndir innan dagstovn ella døgnstovn.

og at viðkomandi er búgvin og torir at tosa um forðingar og vera opin fyri neyðugari menning í arbeiðinum.

Sum liður í menningini av starvsfólkunum verður javnan skipað fyri skeiðtiltøkum.

Stuðulsfólkaskipanin hjá Tórshavnar kommunu søkir eisini eftir pedagoki at manna fasta stuðulsbólkin frá august í ár.

Meira fæst at vita við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara fyri Stuðulsfólkaskipanina, tlf 1.5160, lokal 211.

Umsókn við prógvum o.o. verður at senda Tórshavnar byráð, postboks 32,110 Tórshavn, í seinasta lagi 19. mars 1997.

Tórshavnar býráð

Skrivstovunæmingur

Vit kunnu bjóða næmingi við FHS-prógvi, áhugaverda og fjølbroytta útbúgving á skrivstovu okkara.

Sendið skrivliga umsókn við prógvum til.

P/F Svend Krosstein
Postbox 3229 · 110 Tórshavn

Hetta vikuskiftið er stongt vegna umbygging Skáin Hollywood